## Gjørdu seg inn á bilin hjá Park



Manchester United-spælarin Ji-Sung Park hevur skift bil. Orsøkin er, at Kia-bilurin hjá honum fekk ikki frið fyri liðfeløgunum, sum í heilum gjørdi seg inn á bilin. Park hevur Kia sum sponsor, og hann hevur brúkt ein av smærru bilunum hjá Kia til at koyra í. Liðfelagarnir í Manchester United hava fleiri ferðir verið úti eftir tí lítla bilinum, og teir hava tikið viskararnar og síðuspegl av bilinum og hava enntá punkterað hann. Nú hevur Park fingið sær ein størri Audi-bil at koyra í, og so vónar hann at fáa frið fyri teimum nasku liðfeløgunum.

## Raul vil hava Laudrup

Liðformaðurin hjá Real Madrid, Raúl, heldur, at danin Michael Laudrup kundi verið rætti venjarin til felagið. Í eini samtalu við Ekstrablaðið sigur Raúl, at Laudrup var ein framúr spælari og ein stórur persónur uttanfyri vøllin, tá ið hann spældi í Real Madrid.

– Um Laudrup hevði fingið høvi at gjøgnumført sína fótbóltsfilosofi í Real Madrid, so er tað einki mark fyri, hvat vit kundu nátt, sigur Raúl við Ekstrablaðið.

B36-KÍ 1-1 (1-1):

# Effektivir klaksvíkingar

*B36*

*KÍ*

**B36 hevði bóltin meira, men KÍ var vandamiklari, tá liðini býttu stigini sínamillum í Gundadali skírisdag**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Nógvir av heimaáskoðarunum náddu ikki somikið sum at síggja tað, sum skuldi vísa seg at gerast teirra hæddarpunkt á degnum. Bólturin var ikki meira enn givin upp, tá Sylla streyk avstað í síðuni. Neyva innleggið ferðaðist upp um Meinhardt Joensen í KÍ-málinum, og so kundi Fróði Benjaminsen við handaru stong stýra í kassan.

**Yvirfólkaðu miðvøllin**

Jú, tað var heilt skjótt, at B36 vístu, hvat teir ætlaðu við dystinum móti skírisdag. Málið tóktist eina løtu bara seta enn meira ferð á, men spakuliga fingu gestirnir tó eisini eitt ávíst tak á dystinum. Ikki soleiðis at KÍ setti seg á spælið, men við skilagóðum kontraspælið fóru teir nú eisini at hótta. Og tó at útjavnandi málið var ein perla av einum deyðbólti, so var tað sum so als ikki so óuppiborið.

Og so slapp KÍ av álvara at spæla tolna kontraspælið, sum liðið tykist trívast væl við í ár. Við eini verju, sum fyri tað nógva er sett saman av garvaðum veteranum, og einum bæði vælpakkaðum og hartarbeiðandi miðvølli eru fortreytirnar fyri hesum góðar. At B36 so eisini optimeraði hesar við støðugt at hava allar tríggjar sentralu miðvallararnar á linju, er ein onnur søga, men henni tóktist KÍ tó ikki at hava nakað ímóti.

Og í veruleikanum var KÍ nakað nógv nærri sigrinum, enn B36 var tað. Sæð burtur frá einum drønskoti á tvørtræið frá Santos fyri steðgin, og eini góðari roynd frá mest sum blankum Fróða Benjaminsen móti dystarenda, so var tað sjáldan, at KÍ-málið av álvara var hótt.

Opnu møguleikarnir hjá KÍ vóru kanska heldur ikki so heilt nógvir, men oftani var talan um ítøkiliga hóttanir kortini. Ikki minst skapti Hjalgrím Elttør støðuga órógva í hvítu verjuni, og tað var eisini hann, sum var upphavið til størsta møguleikan í dystinum. Men ta ferðina fekk Símun Joensen ikki rættiliga skot á bóltin, sum fór grøvandi omanfyri mest sum manntóma B36-málið.

**Bæði og**

Alt íalt, so var talan kanska um ein rættvísan javnleik, men fyri báðar partar var galdandi, at tey kundu bæði vera nøgdir - og ikki. B36, tí tað sjálvandi altíð ræður um at vinna á heimavølli. Men við tveimum útisigrinum í skjáttuni, var javnleikurin kortini til at liva við. KÍ, tí ein javnleikurin á útivølli móti meistarunum sjálvandi ikki er at kimsaa at. Men sum dysturin tók skap, so kundi talan eins væl verið um trý stig.

Um visjón 2009 er komin nærri Klaksvíkini, er enn ilt at siga, men danska orðafellið sigur, at ein góð byrjan er helvtin av verkinum. Og í so máta hava bæði KÍ og Tony Paris helst nógv at gleða seg til.



*Hartarbeiðandi og væl mannaði KÍ-miðvøllurin hevði fyri tað nógva takið á sterku miðspælarunum hjá B36*

*Mynd: Álvur*

# Sekkur til suðuroyingar

*Skála*

*VB*

**Tað skulu heilt aðrir bollar á suppuna, um teir í VB/Sumba skulu hava møguleika at spæla seg til stig og sigrar**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Fótbólturin hevur tað ikki gott í Suðuroy. Tað hava úrslitini í hesum kappingarárinum boðað frá. Á Skála Skírisdag fingu áskoðararnir hetta so rudduliga staðfest.

VB/Sumba vóru komnir norður at verja um tað, sum teir høvdu í viðførinum. Í 1. hálvleiki vóru teir sera varnir. Eftir steðgin fluttu teir seg longri fram, og tá høvdu teir bóltin ikki so heilt lítið. Fyrri parturin av 2. hálvleiki minti ikki so lítið um 3. deildardyst av gamla slagnum. VB/Sumba hevði bóltin ein part av tíðini, men teir vóru sørir frameftir, og teir á heimaliðnum vóru lítið áhugaðir í at blanda seg ov nógv.

Vlada Filipovic, sum var komin aftur í Skála málið, hóast hann framvegis tykist eitt sindur skaddur, hevði millum evarska lítið og einki at gera.

At heimasigurin ikki gjørdist størri enn 5-0, átti VB/Sumba málverjin Marcin Dawid sín part av heiðrinum fyri.

Undan steðginum var tað Alexandur Johansen, sum skoraði tvey mál. Í útgangsstøðuni var hann frammarlaga í vinstra borði. Hann reikaði nógv, og í tí leiklutinum trívst hann væl. Eftir steðgin kom Alexandur ikki á vøllin. Eftir drúgva skaðasteðgin, sum helt honum burtur frá fótbólti mest sum alt árið í fjør, er eingin orsøk at leggja ov nógv fyri. Serliga tá ið spurningurin var avgreiddur, hvagar stigini skuldu fara, og tá ið avloysarin var so góður, sum Levi Hanssen er tað.

Triðja málið fekk Poul N. Poulsen, sum er uppvaksin í VB, og sum hesa ferð fekk møguleikan í høgru hjá Skála, tí Bjarni Jørgensen var skaddur. Fjórða málið fekk Jónhard Frederiksberg, eftir at hann og Bogi Gregersen høvdu spælt seg ígjøgnum, og liðformaðurin og miðvallar generalurin Pauli G. Hansen setti punktum,

At Skála fekk futt í aftur seinna partin av 2. hálvleiki komst av, at teir umskipaðu eitt sindur. Bárður Danielsen, sum í ár hevur endurvunnið plássið á høgra vongverjanum, sum hann misti eitt skifti eftir summarsteðgin í fjør, fekk loyvi at blanda seg longri frammi á vøllinum, meðan Pætur Dam Jacobsen, sum tað í orðsins sanna týdningi haltaði eitt sindur hjá, varð fluttur longri aftur, har hann ikki hevði trupulleikar at taka sær av verjuuppgávuni.